út at koyra

Honda Insight

Honda er komin á markna›in vi› einum orkusparandi hybridbili, i› hevur ein 3 syl.1000 cc bensinmotor, saman vi› einum el-motori, sum hjálpir til, tá tørvur er á meira kraft.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Ford sendir bilar til Svøríkis

Meginparturin av bilunum hjá Fordkonsernini ver›a sendir til eitt crashtestsentur hjá Volvo í Svøríki, i› er eitt ta› mest framkomna í heiminum.

Kelda: Bilen Motor & Sport



Altjó›a bilaframs‡ning í Keypmannahavn

Altjó›a bilaframs‡ningin, Copenhagen International Motor Show, ver›ur í døgunum frá 8. til og vi› 19 november í ár. Higartil hava 63 ymiskar bilfyritøkur melda› seg til.

Kelda: Motor Magasinet

Mercedes vi› n‡ggjum C - klassa

Magnus Gunnarsson

Nú eru li›in 17 ár sí›an fyrsti Mercedes C kom á markna›in í 1983. Hann var› framleiddur fram til 1993, tá n‡tt modell kom, i› hevur koyrt til í ár.

Eftir at hava arbeitt í f‡ra ár og gjørt eina íløgu uppá millum 11 og 12 milliardir krónur er ein n‡ggjur Mercedes C komin, i› ver›ur mettur sum naka› av tí allar besta, sum er komi› frá verksmi›juni í Stuttgart. Vi› C-klassanum kappast Mercedes vi› BMW 3-rø›ina.

Tannstongst‡ring og bakhjólstrekk

Sjálvt um bilurin minnir um forgangarin, er einki eftir av tí gamla modellinum, sum annars var ein gó›ur bilur.

Bilurin er ikki vaksin uttan, men innan er betri pláss, og vi›førisrúmi› er størri. Ein onnur broyting er, at endiliga hevur bilurin fingi› tannstongst‡ring, me›an hann enn hevur bakhjólstrekk.

Hann fæst vi› seks trins gearkassa, ella fimm trins automatiskan Speedtronic gearkassa. Eins og tann størri S-klassin, hevur hesin eisini blinkljós í speglunum.

Classic, Elegance og Avant Garde

Tríggjar útgávur eru at velja ímillum, Classic, Elegance og Avant Garde, og listin yvir útger›ina er næstan óendaligur. Har er nærmast alt, sum hugsast kann. Hann hevur t.d. ABS bremsur, ESP stabilisatorsystem, antispinn, klimaanlegg, dupultar airbag framman, sí›uairbag, og window-airbag í bá›um sí›um, sum verjir høvdi› í einum samanstoyti frá sí›uni.

Bilurin kann fáast vi› einari telefon, har eigarin kann tr‡sta á ein knøtt, um hann hevur trupulleikar vi› bilinum, ella er úti fyri einum óhappi. Tá fær kundami›stø›in hjá Mercedes Benz bo› og kann koma til hjálpar.

Teir síggja beinanvegin, hvar bilurin er staddur. Um hendan skipan kann brúkast í Føroyum, vita vit ikki enn.

Brake Assist System

Bilurin hevur eina n‡ggja Brake Assist System (BAS) bremsuskipan, i› virkar solei›is, at bilurin bremsar hart í fyrstu syftu, tá bremsa› ver›ur. Hetta økir munandi um trygdina. Sjey ymiskir bensin- og dieselmotorar eru at velja ímillum. Eisini hevur verksmi›jan gjørt alt fyri at minka um olju- og bensin n‡tsluna, samstundis sum dálkingin er so lítil, at motorarnir lúka øll krøv til dálking, sum koma í gildi í 2005.

Mercedes C-klassin er ikki nakar bíligur bilur, men gó›skan og trygdin er á høgum stø›i, og eftirspurningurin er stórur. Næsta ár ver›ur væntandi ein stationvognur vi› í skránni.

Keldur: Motor Magasinet og Bilen Motor & Sport



út at koyra

Vitja›u føroysk alibrúk vi› Ford F-250

Magnus Gunnarsson

Sí›st í mai mána›i vóru umbo› fyri norsku fyritøkuna, Lift-Up, og vitja›u á fleiri alibrúkum í Føroyum. Stjórin á fyritøkuni, Einar Holmefjord, og nevndarforma›urin, Jørgin Gunnarsson, sum eisini b‡r í Norra, vóru her, og høvdu teir ein stóran Ford F-250 jeep vi› sær.

Einar Holmefjord og Jørgin Gunnarsson vi› Ford jeepinum. Jørgin eigur eisini fyritøkuna, Akva-Trade, i› umbo›ar Bridgestone aliringar og a›ra aliútger›

Stórsti útflutningsmarkna›ur

Tá Einar Holmefjord í 1984 kom at arbei›a í alivinnuni, var hann var›ugur vi› trupulleikarnar av, at dey›ur fiskur og anna› avfall lá á botninum í aliringunum. Hetta førdi vi› sær, at hann mi›víst arbeiddi vi› eini loysn á hesum trupulleika. Í 1990 hev›i hann upfunni› eina skipan, sum hann fekk patent uppá. Sama ári› stovnar hann sína egnu fyritøku, Lift Up Akva AS.

Uppfinningin hjá Einar Holmefjord bleiv sera væl móttikin, tí alarar vita, at dey›ur fiskur á botninum í aliringum, kann vera orsøk til, at sjúkur fara at brei›a seg. Tí er umrá›andi at fáa tann dey›a fiskin úr ringinum beinanvegin.

Skipanin virkar á tann hátt, at ein glastrevja trakt ver›ur sett í botnin á aliringinum. Úr traktini ver›ur ein slanga vi› samanpressa›ari luft løgd upp til vatnskorpuna og í ein skiljikassa, har dey›ur fiskur, fó›ur, i› ikki er eti› upp og avfall kemur upp vi›. Á henda hátt ver›ur alt avfalli› leitt burtur frá alibrúkunum.

Føroyar eru størsti útflutningsmarkna›ur hjá Lift Up, og flestu stóru alibrúkini her hjá okkum eru kundar hjá teimum. Fyritøkan ver›ur umbo›a› á teimum stóru alimessum um allan heimin og selur til lond sum t. d. Japan, USA, Portugal og Malta.

Ford F vi› 7.3 l motori og 320 hestum

Bilurin hjá stjóranum er ein stórur Ford Super Duty F-250 jeepur, vi› einum 7,3 litur Power Stroke V8 diesel motori vi› 320 HK, Turbo og Intercooler.

Sum seks persóna privatbilur kostar hann 800.000 krónur, men hesin bilurin er keyptur uttan baksetur, og var hann hálva millión norskar krónur bíligari – og kosta›i 300.000 krónur. Tá hevur hann pláss til tvey fer›andi umframt føraran.

Eftir norskum reglum krevst tá koyrikort til lítlan lastbil upp til 7500 kg. Bilurin hevur loyvi at draga annhangara upp til 6 tons.

Tær n‡mótans sí›uhur›arnar eru gjørdar solei›is, at tá bá›ar hur›arnar ver›a latnar upp samstundis, er eingin stólpi í millum og lætt er at koma inn og út.

Bilurin hevur bakhjólstrekk og kann skifta til f‡rahjólstrekk me›an koyrt ver›ur vi› 100 km/t.

Annars hevur bilurin fartpilot, overdrive, airbag framman, myrkt glas á aftaru rútunum.

Ford F er ein av heimsins mest seldu bilum, og eru næstan 30 milliónir gjørdir, sí›an teir fyrstu fer› komu á markan›in í 1948.

Ford F hava ikki veri› markna›arførdir í Danmark, tí teir vóru mettir at vera ov stórir og d‡rir.

LIFTUP skipanin



Skipanin virkar á tann hátt, at ein glastrevja trakt ver›ur sett í botnin á aliringinum. Úr traktini ver›ur ein slanga vi› samanpressa›ari luft løgd upp til vatnskorpuna og í ein skiljikassa, har dey›ur fiskur, fó›ur, i› ikki er eti› upp og avfall kemur upp vi›. Á henda hátt ver›ur alt avfalli› leitt burtur frá alibrúkunum.